FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Tvørfaklig heimsmál sum burðardyggur vitanarberi


**Erla Olsen**

Lektari í lívfrøði og náttúrulærufrøði


Læraradagar í Norðurlandahúsinum

6. & 7. nov. 2018

# Tvørfaklig heimsmál sum burðardyggur vitanarberi

- Tey seytjan heimsmálini tykjast ymisk, men eru øll tengd at hvør øðrum.
- Nøkur snúgva seg um ítøkiliga vitan, meðan onnur kunnu í fyrstu syftu tykjast meira mentanarlig ella sosial.
- Heimsmálini seta heildarmenniskjuna á breddan – eina menniskju, sum tekur atlit til umhvørvið, bæði nær og fjar, og sum eisini hugsar um dagin í morgin.
- Útbúgvinginarskipanin hjá okkum er tó ikki lagað til heildarmenniskjuna, men til eina menniskju sum hugsar í kassum, og sum hugsavnar seg um eitt í senn.
- Stór krøv verða sett til skúlan, um hann skal fyrireika næmingarnar til framtíðarsamfelagið, sum verður munandi øðrvísi enn tað, vit kenna í dag.
- Broytingarnar koma ikki tí vit vilja tað, men tí ovurnýtsla og veðurlagsbroytingar krevja tað.

# Ynski um broyting ikki ein nýggj søga

- John Dewey (1916): Skúlin er gjørdur til bóndasamfelagið, har børnini læra við at luttaka í arbeiðinum
- Woodrow Wilson: Tað er lættari at flyta ein kirkjugarð, enn at broyta námsætlanirnar hjá skúlunum.
- Niðurstøður frá verkætlanum hjá Námsvísindadeildini benda á, at tað er trupult at broyta arbeiðslag.
  - Viljin er til staðar
  - Skipanin tung at broyta

- Týdningarmikil orð í skúlahøpi:
- **Hvat**, **hví** og **hvussu**
  - **Viðkomandi spurningar hjá bæði næmingum og lærarum**
    - Vita allir lærarar hví tey undirvísa í ymsu evnunum?
    - Vita allir næmingar hví ymsu evnini eru viðkomandi?
    - Hvørjir undirvísingarhættir t.d. verða brúktir?
    - Flestu vita hvat undirvíst verður í

- **Næmingalagað undirvísing**
  - Ymsir næmingar leggja dent á ymist



# Spurningar í spurnakanning um týdningin av ymsu lærugreinunum:

- Hvussu stóran ella lítlan týdning heldur tú hesar lærugreinar niðanfyri hava?

- Hvussu stuttligar ella keðiligar heldur tú hesar niðanfyri lærugreinar vera?

# Tvey sløg av lærugreinum

- Samband millum hvussu týdningarmikið eitt fak er og hvussu stuttligt tað er.
- Er fakið viðkomandi, er tað eisini stuttligt



# Biophilia: Lurta, skapa og lær

At kombinera tónleik, kreativitet og náttúruvísindi

**Norðurlendsk verkætlan**

- Tvørfaklig undirvísing
- Evni heldur enn fak
- Tónleikaástøði, ílegufrøði, stjørnufrøði, alisfrøði, samfelagsfrøði… mál, bókmentir og filmur
- Brúka tøkni, KT og hendur

**Við Björk ígjøgnum kjarnuholið**



# Ætlanin hjá Norðurlandaráðnum

- Stimbra áhugan hjá børnum og ungdómum fyri vísindum og nýskapan
- Samansjóða útbúgving, mentan og vísindi
- Endavenda siðbundnu undirvísingarhættunum
- Fáa at vita bæði um tónleikaástøði OG um mánar, krystall, snarljós, DNA og virus…

# Hví hava vit brúk fyri Biophilia?

Heildarmenniskju

Fakligt snævursýni innan verkfrøði, fíggjarheim og entreprenørar

Náttúran og grøn orka

Ísland er ikki til sølu!

Skipað útbúgving til øll fak innan estetikk, etikk, kreativitet, søgu og náttúruvirði!

Nøkur føroysk dømi?





# Drúgva takið: Skúlarnir

- Fakuppbýtti skúladagurin ein forðing
- “Tónleikurin hjá Björk er avbjóðandi”
- Neyðugt við føroyskum sjónarhorni
- Lærarar samstarva ikki serliga nógv
- Lærarar arbeiða sera sjáldan tvørfakliga
- Ymiskar tilgongdir á ymsu skúlunum
- Neyðugt at byggja á verandi strukturar

SKÚLAMENTANIN IKKI BROYTT
EFTIR EINUM DEGI

*Ratatoskur hevur havt úr at gera*



PARSETUR

# Lívsins træ og “Earth Anew”

## Arbeiðið heldur fram

- Frá virus, DNA og einstøkum kyknum til plantur, soppar og djór
- Yggdrasil og norðurlendsk mytologi
- Norðurlendsk mentan og samstarv
- Ratatoskur og hinar verurnar
- Ragnarok og veðurlagsbroytingar
- Vón og “Earth Anew”

- Lívfrøði, tónleikur, veðurfrøði, evnafrøði, religión og skaldskapur
- Biophilia arbeiðshátturin heldur fram… - men við einum føroyskum snari






FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Samanumtøka úr Biophiliaverkætlanini

- Samfelagið er fjølsamansett
- Vitan er fjølsamansett
- Skúlin er fakuppbýttur
- At duga eitt evni krevur vitan um innihald, háttalag og ástøðiligt grundarlag
- Fjølsamansett fak krevja tvørfakligt samstarv
- Byrja við okkum sjálvum á læraraútbúgvingunum

# Temavika um heimsmálini

## Hildin í viku 39, sum er vikan sum UNESCO eru ognað heimsmálunum

- Øll lesandi og allir undirvísarar arbeiddu í eina viku
- Hvør dagur byrjaði við einum fyrilestri
- Síðan var arbeitt í verkstovum
- Evnisvikan skuldi enda við onkrum, sum kundi vísast fram
- Evnisvikan var partur av skeiðum, sum tey lesandi tóku
- Ymist hvørji krøv vórðu sett í ymsu skeiðunum
- Nógv tilfar til børn og undirvísing framleitt
- Sera ymisk upplegg



# Fátækradømi og endurnýtsla






# Eftirmeting av verkstovunum

| Vóru verkstovurnar…. | |
|---|---|
| Lærara stýrdar | 3% |
| Lesandi stýrdar | 60% |
| Bæði | 35% |

| Var nóg nógv tíð sett av til verkstovurnar? | |
|---|---|
| Alt ov nógv tíð | 1% |
| Sindur ov nógv tíð | 9% |
| Hóskandi tíð | 63% |
| Sindur ov lítið av tíð | 15% |
| Nógv ov lítið av tíð | 11% |

| Hvat lærdi tú mest av í verkstovuarbeiðinum? | |
|---|---|
| Um heimsmálini | 31% |
| Um tað fakliga sum vit hava í skeiðinum | 14% |
| Bæði | 50% |


16 - friður, rættvísi og sterkir stovnar
17 - samstørv um heimsmálini
15 - lív á landi
14 - lív í havi og vatni
13 - veðurlagsátøk
12 - ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla
11 - burðardyggir býir og bygdir
10 - minni ójavni
9 - vinna, nýskapan og undirstøðukervi
8 - sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur
7 - burðardygg orka
6 - reint vatn og reinføri
5 - javnstøða millum kyn
4 - dygdargóð útbúgving
3 - góð heilsa og vælvera
2 - eingin hungur
1 - einki fátækradømi

**Tey 17 heimsmálini fyri burðardyggari menning (2015-2030)**

Tey heimsmál sum mest varð arbeitt við:

4 – Dygdargóð útbúgving (44%)

12 – Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla (22%)

1 – Einki fátækradømi (20%)

5 – Javnstøða millum kyn (18%)

10 – Minni ójavni (17%)

6 – Reint vatn og reinføri (10%)

3 – Góð heilsa og vælvera (8%)

8 – Sømiligt arbeiði og búskaparligur vøkstur (8%)

**Tey átta túsundára-menningarmálini hjá WHO Millennium Development Goals (2000-2015)**

- At beina fyri ringum fátækradømi og hungri
- Grundskúla til øll
- Javnrættini millum kynini og betur kor hjá kvinnum
- At minka um barnadeyða
- At økja um heilsuna hjá mammum
- At beina fyri HIV/AIDS, malaria og øðrum sjúkum
- At tryggja umhvørvisliga burðardygd
- At menna ein alheims felagsskap fyri menning

# Hvørji heimsmál varð ikki arbeitt nógv við?

14 – Lív í havi og vatni (8%) – arbeitt varð mest við plastdálking

7 – Burðardygg orka (4%)

11 – Burðardyggir býir og bygdir (4%)

15 – Lív á landi (4%)

2 – Eingin hungur (3%)

9 – Vinna, nýskapan og undirstøðikervi (3%)

13 – Veðurlagsátøk (3%)

17 – Samstørv um heimsmálini (3%)

16 – Friður, rættvísi og sterkir stovnar (2%)




- Tey mál sum Norðurlond serliga skulu arbeiða við eru:
- 12, 13, 14, 15
- Burðardygd, lívfrøðiligt fjølbroytni, veðurlagsbroytingar
- Á evnisvikuni var ein fyrilestur um heimsmál nr. 12, tað gjørdi helst mun

# Vit skúlafólk – hvat kunnu vit gera?

- Mál 2: Mat til øll
  - Matspill [2]
  - Kompostering av leivdum [12]
  - Gagnnýta lidna kompostin [12]
  - Velta gomul sløg av eplum inni á skúlaøkinum [11, 15]
  - Ikki koyra burturkastið á brennistøðina [11,13]





















Michelle M.L. Lim, Peter Søgaard Jørgensen & Carina A. Wyborn (2018). Reframing the sustainable development goals to achieve sustainable development in the Anthropocene – a System approach. Ecology and Society 23(3): 22

| Nr. | Heimsmál heiti | Tal av heimsmálum hetta heimsmál ella undirmál…. | |
|---|---|---|---|
| | | hevur ávirkan á | er ávirkað av |
| 1 | Basa fátækradømi | 5 | **16** |
| 2 | Mat til øll | 3 | **15** |
| 3 | Góð heilsa og vælvera | 6 | 12 |
| 4 | Góðska í útbúgving | **17** | 4 |
| 8 | Skapa burðardyggan búskaparligan vøkstur | 10 | **19** |
| 16 | Friður, rættvísi og sterkir stovnar | 5 | 12 |

Heimsmálini nr. 16 og 17, um frið, rættvísi og sterkar stovnar og um samstørv um heimsmálini snúgva seg um.










Góðska í útbúgving er tað “vanliga” heimsmálið sum hevur ávirkan á flest onnur heimsmál.

Michelle M.L. Lim, Peter Søgaard Jørgensen & Carina A. Wyborn (2018). Reframing the sustainable development goals to achieve sustainable development in the Anthropocene – a System approach. Ecology and Society 23(3): 22

# Burðardygga framtíðin

- Í 60-unum skuldi Havnin skína
- Børnini læra foreldrini… søgdu lærararnir
- Heimsmálini eru tengd tætt at hvør øðrum

Havnin skal skína

- *Er tað skúlans uppgáva at kunna um heimsmálini?*
- *Skulu vit læra um heimsmálini eitt og eitt?*
- *Skulu vit læra um hvussu tey eru tengd hvør at øðrum?*
- *Hvat skal til fyri at heimsmálini eru viðkomandi?*

# Anne Stestenko: Transformative activist stance

- **Umbroytandi aktivisthugburður**
- “Problem-dreingir” gjørdu vísindaliga kanning sum broytti teirra støðu
- Avbjóðingin av broyting í mun til siðvenju
- Broytingar henda støðugt – eisini í okkara tíð
- Umbroytandi aktivisthugburðurin snýr seg um at broyting er møgulig og at sosialar siðvenjur og skipanir eru ikki bert IKKI ómøgulig at broyta, men eru longu í ferð við at verða broytt í skiftinum millum fortíð, nútíð og framtíð
- Leikluturin hjá útbúgvingarskipanini er alneyðugur fyri at veita neyðugu amboðini fyri aktivismu og hervið tryggja umbroytandi sosial skifti.

# Heimsmálini vísa á alneyðugar broytingar

- Hví skulu vit undirvísa í heimsmálunum - 1?
  - Mín útlegging: Tí veðurlagsbroytingar broyta fortreytirnar hjá okkum grundleggjandi
  - Hungur og vatntrot skapa kríggj aðrastaðni í heimi
  - Flóttafólk rýma undan hungri, vatntroti og kríggi
  - Flóttafólk ávirka gerandisdagin í okkara grannalondum
  - Menniskjafatanin broytist – eisini heima hjá okkum

# Hví

- Hví skulu vit undirvísa í heimsmálunum – 2?
  - Mín útlegging: Tí lívfrøðiliga fjølbroytni bæði í sjógvi og landi er í stórari minking
  - Stovnar hóttir bæði vegna veðurlagsbroytingar, minkandi búøki og vantandi stovnsrøkt
  - Samfelagsbúskapurin er treytaður av lívfrøðiligum tilfeingi
  - Aktivisma uttanlands setir treytir fyri hvar vit sleppa at selja okkara fiskatilfeingi – og til hvønn prís

# Hvussu

- Hvussu skulu vit undirvísa?
  - Plastikk-átakið hevur gjørt stóran mun
  - ST leingi mælt til at burðardygd er partur av øllum lærugreinum
  - Burðardygd  komin við í námsætlanirnar í Lívfrøði, Landafrøði, Kristni, Alisfrøði, Handarbeiði og Smíð
  - Skúlin kann virka fyri burðardyggari hugsan
  - Burðardygg hugsan røkkur víða, og skal eisini vísast í verki
  - Tvørfaklig undirvísing ein fyrimunur
  - Aktiv læring, t.d. aktivisma í verki

# The pedagogy of daring (Stetsenko, 2017)

- Dømi um aktivismu (ein aktivistur hevur kannað málið fyrst):
- Í okkara skúla brúka vit ikki plastikk (einnýtis) *(fyri at verja havið)*
- Í okkara skula ganga vit í skúla ella koyra buss *(fyri betri býarumhvørvi)*
- Í okkara skúla eta vit ikki kjøt *(fyri at minka um veðurlagsbroytingar)*

- *Tora og vilja vit eggja næmingum at gerast aktivistar?*
- *Góðtaka foreldrini sum heild slíkt?*
- *Um ikki, tora vit at gera tað kortini?*
- *Og aftur, er tað skúlans uppgáva? Og um ikki, hví ikki?*

# Men….

- Broytingarnar koma ikki tí vit vilja tað, men tí ovurnýtsla og verðurlagsbroytingar krevja tað

- Og tí fara vit at gera broytingar, soleiðis sum vit altíð hava gjørt

*Gott framhaldandi arbeiði við heimsmálunum*
*– tað er alneyðugt!*